# Vápnini hjá Saddam

Saddam Hussein hevur nóg mikið av biologiskum og kemiskum vápnum til at beina fyri fólki í hundraðtúsundatali, og fær hann sín vilja, hevur hann skjótt eisini kjarnorkuvápn.

Tað er í hvussu er niðurstøðan hjá amerikansku stjórnini.

Sambært teimum amerikansku kanningunum hevur Irak í hvussu er 8.500 litrar av Anthrax, men tá vápnaeftirlitsmenninir vóru í Irak í nítitárunum, hildu teir, at Irak hevði evni til at gera umleið 25.000 litrar av hesum evninum.

Harafturat siga amerikanarar, at Irak hevur evni til at gera 400 biologiskar bumbur. Sagt verður, at irakar hava útgerð, sum kann gera meiri biologiskt eitur, enn Irak hevði undan Flógvakrígnum. Talan er millum annað um miltbrand, Aflatoxin og Ricin. Harumframt vilja amerikanarar vera við, at Irak hevur stórar goymslur av ymsum bakterium so sum tyfus, kolbrandi, kolera og koppum.

Tá talan er um kemisk vápn, siga amerikanarar seg hava prógv fyri, at Irak hevur fleiri slík vápn á goymslu, og at tey vandamestu av hesum eru sinnopsgass og nervagassið VX. Hildið verður, at Irak hevur einar 550 granatir við sinnopsgassi, og at landið hevur útgerð til at gera umleið 500 tons av slíkum vápnum. Oman á hetta kemur so, at síðani kríggið millum Irak og Iran eru umleið 1.000 tons av kemiskum vápnum horvin í Irak, og irakar hava ikki verið førir fyri at greiða frá, hvat er vorðið av teimum.

Amerikanarar halda ikki, at Irak hevur kjarnorkuvápn, men at lítið restar í, til tann fyrsta irakska kjarnorkubumban er veruleiki. Irak hevur tann neyðuga kunnleikan og tøknina til at gera kjarnorkuvápn, men landinum tørvar útgerð til at ríka uran. Sambært USA hevur Irak fleiri ferðir roynt at fáa fatur á hesari útgerðini.

Sambært ST-samtyktum hevur Irak ikki loyvi at hava rakettir, sum bera longri enn 150 kilometrar, men amerikanarar siga, at irakar hava einar tólv rakettir, sum bera millum 650 og 900 kilometrar. Haraftúrat hava teir eina verkætlan, sum umfatar rakettir, ið kunnu flúgva meiri enn 1.000 kilometrar, og teir eru eisini í ferð við at gera eina aðra rakett, sum fer at røkka 1.200 kilometrar.

At enda vil USA vera við, at irakar hava roynt at ment eitt lítið ómannað flogfar, sum kann flyta bæði kemisk og biologisk vápn.

# Norðurkorea hóttir við kríggi



*So tættir standa teir á koreanska markinum. Fremst á myndini ein amerikanskur og ein suðurkoreanskur hermaður, aftanfyri ein norðurkoreanskur hermaður. Nú hóttir Norðurkorea við kríggi*

**Norðurkorea kann fara at leypa á amerikanararnar heldur enn at bíða eftir, at USA fer at leypa á landið, tá kríggið við Irak er av**

NORÐURKOREA-USA
*Árni Joensen:*

Tað sigur ein talsmaður hjá stjórnini í Pyongyang við bretska blaðið The Guardian.

- USA sigur, at tað skal avgreiða Irak fyrst, og at vit eru næst í røðini. Men vit hava okkara móttiltøk. Tað eru ikki bara amerikanararnir, sum kunnu fremja fyribyrgjandi álop, sigur Ri Pyong-gap við blaðið.

Ávaringin hjá tals-manninum kom, samstundis sum suðurkoreanska tíðindastovan Yonhap endurgav tað størsta noðurkoreanska blaðið, Rodong Simmun, fyri at hava havt líknandi ávaringar.

- Fremja amerikanarar eitt sokallað fyribyrgjandi álop á okkara friðarligu kjarnorkuverk, fara vit at svara aftur við kríggi, veruligum kríggi, skrivaði tað norðurkoreanska blaðið sambært Yonhap.

Blaðið vil vera við, at amerikanararnir eru í ferð við at fyrireika eitt álop á tað týdningarmesta norðurkoreanska kjarnorkuverkið, Yongbyon, sum sambært norðurkoreansku myndugleikunum verður nýtt til at útvega landinum ta neyðugu elorkuna.

Amerikanarar hava avsannað, at teir ætla at leypa á Norðurkorea. Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, hevur kortini sagt, at tað kann gerast ein trupulleiki fyri norðurkoreanar, taka teir sína kjarnorkuverkætlan uppaftur, og um teir fara at útvega sær sjálvum og øðrum kjarnorkuvápn.

# Ivi um amerikansku prógvini

**Sambært amerikanska uttanríkisráðharranum, Colin Powell, skal eingin vera í iva um, at prógvini, sum hann legði fyri ST-trygdarráðið, eru haldgóð, men tey ivingarsomu lótu seg ikki sannføra**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Hóast amerikanski uttanríkisráðharrin nýtti bæði myndir, avlurtingar og fregnartænastufrágreiðingar, tá hann royndi at sannføra limirnar í ST-trygdarráðnum um, at Irak hevur hópoyðingarvápn, tóktist tað ikki sannføra tey londini, sum frammanundan ivaðust í, hvussu gott amerikanska grundarlagið fyri einum møguligum álopi var.

Russiski uttanríkisráðharrin, Igor Ivanov, vissaði sín amerikanska starvsbróður um, at hann hevði lurtað væl eftir tí, sum hesin hevði sagt. Hann helt, at londini eiga nú at kanna amerikanska próvtilfarið, og meðan tað verður gjørt, skulu kanningarnar hjá vápnaeftirlitsmonnunum halda fram.

Frakland ávaraði eisini trygdarráðið ímóti at leypa framav. Dominique Villipin, uttanríkisráðharri, viðgekk, at Irak hevur ikki gjørt, sum landinum er álagt, og hann mælti til at tvífalda ella trífalda talið á eftirlitsmonnum, samstundis sum flogeftirlitið skal økjast.

Kinesiski uttanríkisráðharrin, Tang Jiaxuan, helt, at so leingi tað er møguligt at loysa kreppuna á friðarligan hátt, eiga allir partar at virka fyri tí.

Bara tann bretski uttanríkisráðharrin, Jack Straw, segði seg hava fult álit á amerikansku prógvunum.

Standa Russland, Kina og Frakland við sítt, noyðist USA helst at sleppa vónini um stuðul frá trygdarráðnum, tí øll trý londini hava sýtingarrætt í ráðnum, men George W. Bush, forseti hevur sagt, at støðan hjá trygdarráðnum verður ikki avgerandi fyri ta avgerð, sum hann fer at taka.

# Tann beri heilaspuni

**Sum væntað vísa irakar amerikanska próvtilfarinum aftur**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

- Hatta var lygn úr einum enda í annan. Tann beri heilaspuni, og endamálið var ikki annað enn at útvega USA eina umbering fyri at rættvísgera eitt álop á Irak.

Hetta var tann fyrsta almenna irakska viðmerkingin til røðuna hjá Colin Powell í ST-trygdarráðnum.

Amer al-Saadi, sum er ráðgevi hjá Saddam Hussein, forseta, segði, at Irak fjalir einki og hevur einki at fjala. Hann helt haraftur-ímóti, at tað, sum Powell legði fram, prógvar, at USA brýtur ta seinastu ST-samtyktina um Irak, tí sambært henni skulu øll londini útvega vápnaeftirlitsmonnunum og altjóða kjarnorkustovninum alt tað tilfar, sum tey hava um Irak. Tað hevur USA ikki gjørt, segði irakski ráðgevin.



# Nærlagdur gamal krígsmaður




**Colin Powell hevur verið roknaður sum dúgvan millum heykarnar í amerikansku stjórnini, men við sínum stóra sjálvsáliti og nærlagni hevur hann víst, at stundum er tað dúgvan, sum vinnur**

*ÁRNI JOENSEN:*

Heykur ella dúgva? Higartil hevur Colin Powell, uttanríkisráðharri verið roknaður sum dúgvan í stjórnini hjá George W. Bush, forseta, har heykarnir sita tættir. Hann er maðurin, sum amerikanarar seta sítt álit á, tá tað ræður um at sannføra umheimin um, at tað er neyðugt at fara í kríggj við Saddam Hussein eina ferð afturat.

Krígsmaðurin Powell er fyrrverandi generalur við fýra stjørnum á økslini, hann hevur verið trygdarpolitiskur ráðgevi, og tey eru mong, sum halda, at hann hevði kunnað verið forsetavalevni, hevði hann havt hug til tess. Undir Flógvakrígnum fyri tólv árum síðani var tann fremsti ráðgevin hjá táverandi George Bush, forseta.

Árini síðani hevur hann ofta verið frammi alment, men neyvan nakrantíð hava so mong eygleitt hann, sum tá hann fyrradagin royndi at sannføra altjóða samfelagið um, at Saddam Hussein fjalir eina rúgvu av ólógligum vápnum. Tað sást, at hann hevði fyrireikað seg væl, og hann var nærlagdur sum altíð. Uppgávan var eisini stór. Hann skuldi sannføra hinar limirnar í trygdarráðnum og altjóða samfelagið um, at Saddam Hussein er fullur av lygn, og at amerikanska stjórnarumsitingin hevur prógv fyri, at so er.

## Vinnur í seinna enda

Colin Powell er tann føddi hermaðurin, og ábyrgdarkensla og loyalitetur eru hansara eyðkenni, siga tey, sum kenna hann.

Tað er alment kent, at hann stundum hevur havt tað strævið, síðani hann tók við uttanríkisráðharrastarvinum. Millum embætismenninar í uttanríkisráðnum er hann nógv avhildin, men hann hevur havt mangan dystin við politikkin hjá Hvítu Húsunum, verjumálaráðnum og ikki minst Dick Cheney, varaforseta. Fleiri ferðir tapti hann í fyrsta umfari, men nakrar mánaðir seinni vísti tað kortini, at tað var hann, sum hevði havt rætt. Ella sum ein av embætismonnum hansara í uttanríkisráðnum segði herfyri:

- Vit vinna meiri, enn vit tapa, men tað er bara so leingi at bíða eftir sigrinum.

Powell verður sagdur at vera ein maður, sum hevur álit á sær sjálvum, og tá hann tók orðið í trygdarráðnum mikudagin, mundi hann eisini kenna seg vísan í, at tað, sum hann hevði at siga, fór at ávirka tey, sum lurtaðu og hugdu. Hann var sannførdur um, at myndirnar, sum hann vísti, søgdu sannleikan, og at ljóðbondini, sum hann spældi, søgdu eisini sannleikan.

Men hann visti eisini, at uppgávan var alt annað enn løtt. Í trygdarráðnum er ivi um amerikanska próvtilfarið, í Kongressini er somuleiðis ivi um álopsætlanina hjá forsetanum, og fjølmiðlarnir - heldur ikki teir amerikansku - hava svølgt tað, sum er lagt á borðið.

## Stórt álit

Tað er sagt, at Colin Powell er sera nærlagdur og umhugsin, og at hann kannar allar upplýsingar, eisini ta minstu, áðrenn hann kunnar almenningin. Hetta skal fregnartænastan CIA hava sannað meiri enn einaferð, síðani hann tók við.

Eitt er altjóða samfelagið, eitt annað er tað amerikanska samfelagið, og tá tað snýr seg um tað seinna, leggur Colin Powell stóran dent á at varðveita sítt trúvirði. At tað hevur eydnast tí gamla nærlagda hermanninum at varðveita sítt trúvirði sást í einari meiningakanning, sum varð gjørd fyrr í vikuni. Har svaraðu 63 prosent av teimum spurdu amerikanarunum, at tey hava størri álit á uttanríkisráðharranum enn á forsetanum. Bara 24 prosent søgdu tað øvugta.